

# Tord Lien helst nýggjur norskur oljumálaráðharri

Jan Müller

15.10.2013 - 21:05

Oljan.fo

Komandi norski orku- og oljumálaráðharrin kemur úr Framburðsflokkinum og eitur Tord Lien. Hann avloysir Ola Borton Moe úr Senterflokkinum.

Tord Lien sat í Stórtinginum frá 2005 til 2013. Hann var valdur fyri Sør-Trøndelag, men kemur úr Myre í Vesterålen. Hann ynskti ikki at taka við eitt sum tingmaður til síðsta val og arbeiðir í dag sum stjóri í TrønderEnergi. Hann hevur sum stórtingslimur verið partur av orku- og umhvørvisnevndini, so hann er ikki ókendur við orkumál, nú flokkur hansara fyri fyrstu ferð nakrantíð verður stjórnarberandi. Tord Lien býr í Trondheimi.

Framburðsflokkurin hevur undan valinum talað fyri at brúka fleiri pengar úr Oljugrunninum. Tað er tó ivasamt, hvat ber til við Høgra við stýrisvøl komandi fýra árini.

Olju- og orkumálaráðið hevur rættiliga stóran týdning í norsku politisku skipanini, nú oljuvinnan er høvuðsgrundarlagið undir norska búskapinum.

Ein kann eisini siga, at fyri føroyingar, sum arbeiða í Norra, man tað eisini hava stóran áhuga at vita, hvør fer at umsita hetta størsta arbeiðsøkið hjá føroyingum í útlandinum